# Deydningar dansa á sandi

## Jógvan Isaksen, 2011

https://nam.mitcfu.fo/CFUFH1690010171

**Lýsing:**




Ein maður verður funnin deyður niðri í fjøruni í Føgrulíð á Borðoynni. Hann er leinkjaður ímillum tveir steinar í sjóvarmálanum. Hannis Martinsson ørminnist, at hann hevur hoyrt um onkran, sum var festur upp á hendan mátan áður, men hevur í fyrstani ilt við at koma í tankar um hvar. Skjótt fer kortini ein deyðadansur fram, sum fevnir úr Kunoy til Sumbiar, og træðrir eru nógv ár aftur í tíðina.

**Lærugrein og stig:**

Føroyskt á A-stigi (1. ella 2. árið). Við smáum tillagingum kann tilfarið eisini brúkast á C-stigi og í hádeild fólkaskúlans.

**Faklig øki**

Við hesum tilfarinum menna næmingarnir m.a. førleikarnar at greina og tulka ymisk tekstsløg og at seta í frásjón. Somuleiðis menna tey førleikarnar at samstarva um skrivlig avrik og munnliga framløgu.

**Tilfar:**

Arbeitt verður við krimisøguni *Deydningar dansa á sandi* (269 s.). Harafturat eru leinki til ymiskt annað tilfar.

**Arbeiðshættir:**

Floksundirvísing, bólkaarbeiði og einsæris arbeiði.

**Tíð:**

4-6 blokkar á 90 min.

© Nám 2023

**Orðaskifti og bólkaarbeiði (1 blokkur)**

> **Fyrireiking heima:**
>
> Les krimisøguna *Deydningar dansa á sandi* og vel nøkur brot (5-10 reglur), sum tú heldur vera serliga áhugaverd.

Hyggið í felag eftir sendingini [25 minuttir: Jógvan Isaksen](), sum varð send í Kringvarpi Føroya 4. februar 2019.

Síðan skulu tit í smáum bólkum skifta orð um sendingina og krimisøguna *Deydningar dansa á sandi*. Tit kunnu m.a. tosa um hesar spurningar:

- Hvussu arbeiðir Jógvan Isaksen, tá hann skrivar krimisøgur?
- Hvat dámdi tykkum krimisøguna *Deydningar dansa á sandi*?
- Lýsir hon viðkomandi evni?
- Er hon realistisk?

Skiftið síðan orð um brotini (5-10 reglur), sum tit hvør sær hava valt. Veljið eitt av teimum at lesa upp fyri flokkinum. Tosið saman í flokkinum um ymsu brotini, sum bólkarnir hava valt.

Síðan skipa tit tykkum í nýggjar bólkar og byrja at arbeiða við uppgávunum niðanfyri.

---

**Greina og tulka (2-3 blokkar)**

Bólkaarbeiði. Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri flokkinum.

**Uppgáva 1) Krimisøgur sum tekstslag**

Lesið "Krimisøga" í verkinum *Hugtøk í bókmentafrøði* og "Tey tíggju boðini hjá krimisøguni" (s. 5 í hesum skjalinum) og greiðið stutt frá innihaldinum.

Lýsið síðan *Deydningar dansa á sandi* viðvíkjandi tekstslagi og teimum tíggju boðunum hjá krimisøguni. Vísið á ítøkilig dømi úr tekstunum og úr krimisøguni. Metið síðan um, um *Deydningar dansa á sandi* uppfyllir krøvini fyri at vera ein góð krimisøga.

Gerið at enda stuttan samandrátt av partinum "Ljóðligar íður" (s. 9-59).

**Uppgáva 2) Bygnaður**

Setið krimisøguna inn í frásagnarfrymilin og greiðið stutt frá, hvat hendir í krimisøguni fyri hvønn partin í frásagnarfrymlinum. Lesið meira um frásagnarfrymilin í *Sýni & Dýpi 1*.

Lýsið síðan, hvussu yrkingar eftir Christian Matras skapa karm um krimisøguna. Greinið og tulkið yrkingarnar og samanberið innihaldið í ymsu pørtunum í krimisøguni við yrkingarnar. Vísið á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

Gerið at enda stuttan samandrátt av partinum "Fólk eins og skuggar rýma" (s. 63-120).

© Nám 2023

### Uppgáva 3) Málsligur stílur og umhvørvi

Greiðið frá skrivingarlagnum og vísið á ítøkilig dømi úr krimisøguni um málsligan stíl. Er málsligi stílurin høgur/lágur, og er málið háfloygt/gerandisligt? Verður speisemi nýtt?

Greiðið eisini frá umhvørvinum í krimisøguni. Hvussu verða føroyingar og føroyska samfelagið lýst? Vísið á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

Gerið at enda stuttan samandrátt av partinum "Dunið frá dimmilunda" (s. 123-202).

### Uppgáva 4) Hannis Martinsson

Gerið yvirlit yvir persónarnar í krimisøguni og lýsið samband teirra við Hannis Martinsson og/ella brotsverkið. Lýsið síðan Hannis Martinsson og samspælið millum hann og nakrar av týdningarmestu persónunum. Vísið á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

Hvussu samsvarar Hannis Martinsson sum avdúkari við tey tíggju boðini hjá krimisøguni (s. 5 í hesum skjalinum)? Grundgevið við ítøkiligum dømum úr krimisøguni.

Gerið at enda stuttan samandrátt av partinum "Ein varligur dráttur í tara" (s. 205-242).

### Uppgáva 5) Gerningspersónurin og motiv

Lýsið gerningspersónin og motivið við ítøkiligum dømum úr krimisøguni. Nær fær lesarin frænir av, at viðkomandi er gerningspersónurin? Hava ábendingar verið frammanundan? Hvørja fatan fær lesarin av gerningspersóninum og brotsgerðunum? Vísið á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

Hvussu samsvarar gerningspersónurin við tey tíggju boðini hjá krimisøguni (s. 5 í hesum skjalinum)? Grundgevið við ítøkiligum dømum úr krimisøguni.

Gerið at enda stuttan samandrátt av partinum "Dapurt minni" (s. 245-269).

---

### Ymsar uppgávur (1-2 blokkar ella heimaarbeiði)

Ymsar uppgávur at arbeiða við einsæris ella í smáum bólkum.

### Uppgáva 1) Klaksvíksstríðið

Greið frá, hvussu krimisøgan lýsir Klaksvíksstríðið. Vís á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

Kanna so annað tilfar um Klaksvíksstríðið, t.d. kanst tú hyggja at sendingunum *Klaksvíksstríðið* (2008) hjá Kringvarpi Føroya.

Vís á líkleikar og munir á, hvussu Klaksvíksstríðið verður lýst, og met um, nær rithøvundurin heldur seg til veruleikan, og nær hann finnur uppá.

© Nám 2023

**Uppgáva 2) Vakrari enn Havnarvág er orðið pápi**

Á s. 268 verður yrkingin “Vakrari enn Havnarvág er orðið pápi” eftir Jóanes Nielsen nevnd. Greina og tulka yrkingina og samanber yrkjara-egið við Hannis Martinsson. Vís á ítøkilig dømi úr krimisøguni. Met um, hví rithøvundurin velur at taka kendar føroyskar yrkingar við í krimisøguna, og hvørja ávirkan hetta hevur á lesaran.

**Uppgáva 3) Hell hath no fury like a woman scron**

Á s. 155 nýtir Hannis Martinsson orðafellið “Hell hath no fury like a woman scorn” í samrøðu við vinmannin Karl. Kanna, hvaðan hetta orðafellið kemur, hvør merkingin er, og í hvørjum høpi tað plagar at verða nýtt. Met um, hví frásøgufólkið velur at lata Hannis Martinsson nýta hetta orðafellið í samrøðuni við vinmannin. Vís á ítøkilig dømi úr krimisøguni.

**Uppgáva 4) Situr tú seggur í oyðini høll**

Á s. 145 verður yrkingin “Situr tú seggur í oyðini høll” eftir J.H.O. Djurhuus nevnd. Greina og tulka yrkingina og samanber støðuna í yrkingini við støðuna, sum Hannis Martinsson er í. Tak eisini sangin “Suzanne” eftir Leonard Cohen við í viðgerðina. Met um, hví rithøvundurin velur at taka hesar báðar tekstirnar við í krimisøguna, og hvørja ávirkan hetta hevur á lesaran.

**Uppgáva 5) Skriva eina krimisøgu**

Skriva eina krimisøgu (umleið 1.000 orð). Nýt t.d. krimirulettuna (s. 6 í hesum skjalinum) fyri at fáa hugskot.

Hav tey tíggju boðini hjá krimisøguni (s. 5 í hesum skjalinum) í huga, meðan tú skrivar.

**Uppgáva 6) Hannis Martinsson í ávikavist krimisøgu og krimirøð**

Hygg eftir einum ella fleiri pørtum av krimirøðini *Trom* (2022). Samanber Hannis Martinsson í *Deydningar dansa á sandi* og Hannis Martinsson í *Trom* og lýs líkleikar og munir. Hvønn Hannis Martinsson dámar tær betur? Hví?

© Nám 2023

Stefan Brockhoff

# Tey tíggju boðini hjá krimisøguni

*Zürcher Illustrierte*, 5. februar 1937

Leysliga týtt og stytt.

1) Allar gátuførar hendingar í eini krimisøgu skulu fylgjast upp og uppklárast.

2) Hendingar í eini krimisøgu skulu ikki hava til endamáls at lumpa lesaran. Alt, sum hendir, skal verða grundað í søguni í síni heild.

3) Tað er ikki neyðugt hjá frásøgufólkinum at finna upp á nakað originalt. Um eitt morð verður framt, lat so morðvápnið verða okkurt vanligt, sum er tøkt, so sum knívar, veiðibyrsur, ella líknandi.

4) Gerningspersónurin skal sum útgangsstøði vera og bera seg at sum eitt menniskja. Hann/hon má so statt ikki hava yvirnatúrligar kreftir ella hava óvanliga góða atgongd til ymsa hjálp.

5) Avdúkarin skal somuleiðis vera og bera seg at sum eitt menniskja. Hann/hon skal sostatt ikki vera alvitandi, hava yvirnatúrligar kreftir ella ómenniskjuligar eginleikar til at avdúka brotsverk.

6) Ein krimisøga skal lýsa dystin millum snildu gerðirnar hjá gerningspersóninum og gløggskygnið og umhugsnið hjá avdúkaranum, sum føra hann/hana á røttu slóðina.

7) Gerningspersónurin skal hegnisliga vera sameindur partur av søguni. Hann/hon má ikki vera ov sjónlig/ur og vekja ov nógv uppmerksemi beinanvegin. Hinvegin eigur gerningspersónurin heldur ikki at vera so mikið lítið sjónlig/ur, at lesarin kennir seg snýttan, tá gerningspersónurin í endanum verður avdúkaður.

8) Lesarin skal ikki ov tíðliga fáa alt at vita viðvíkjandi motivum, hjálparum, gerningspersónum o.s.fr. Nakað skal verða fjalt fyri lesaranum, men tó ikki ov nógv.

9) Rithøvundurin má ikki møða lesaran við óneyðugum upplýsingum frá rættarfundum o.t. Tá lesarin er liðugur at lesa, skal hann/hon hava greiða fatan av, at samanhangur er millum tað lisna, hendingarnar og søgugongdina.

10) Lesarin skal fáa innlit í týdningarmestu hendingarnar, soleiðis, at hann/hon hevur fatan av at hava verið til staðar og hava fylgt persónunum alla tíðina.

© Nám 2023

# Krimiruletta

**Uppgáva:**

- Tit skulu arbeiða saman tvey og tvey.
- Skiftist um at ringla við einum terningi fyri at fáa upplýsingar til krimisøgunar hjá tykkum.
- So hvørt tit hava ringlað, skulu tit tosa saman um upplýsingarnar, tit hava fingið, og geva hvørjum øðrum hugskot. Minnist til at skriva stikkorð niður.
- Síðan skriva tit krimisøgurnar hvør sær.

**Brotsverkið verður framt:**

1. í einum skúla
2. í SMS
3. umborð á einum skipi
4. í haganum
5. á einum hotelli
6. á eini bensinstøð.

**Brotsverkið er, at:**

1. ein genta verður burturflutt
2. ein kendur persónur verður myrdur
3. ein maður og hundur hansara eru burturblivnir
4. ein stór peningaupphædd verður stolin
5. samleikin hjá einum persóni verður misnýttur til fleiri brotsverk
6. ein útlendskur bilur verður sprongdur í luftina.

**Tann ella tey, sum avdúka brotsverkið, er/u:**

1. tveir tannáringar
2. eitt fyrrverandi løgreglufólk
3. eitt tíðindafólk
4. eitt ungt par
5. ein lummatjóvur
6. ein teldusníkur.

**Gerningspersónurin er:**

1. ein stjóri á eini stórari fyritøku
2. ein útlendingur, sum er komin til Føroya at arbeiða
3. ein sjúkrarøktarfrøðingur
4. ein miðnámsskúlanæmingur
5. ein skipari
6. eitt vaskifólk.